## H1N1 kann geva skúlafrí

Bretskir serfrøðingar mæla nú myndugleikunum til at leingja summarfrítíðina hjá skúlabørnunum í einari roynd at forða svínakríminum at breiða seg. Sambært blaðnum The Guardian siga serfrøðingarnar, at tað ber til at halda sjúkuni niðri og at spara mannalív við at leingja summarfrítíðina hjá skúlunum. Niels Ferguson, sum er ráðgevi hjá stjórnini, sigur við blaðið, at skúlarnir eiga ikki at byrja aftur, fyrr enn tann rætti heilivágurin ímóti kríminum er tøkur. Ed Ball, skúlamálaráðharri, hevur lítlan hug at leingja frítíðina hjá skúlabørnunum. Hann vil í hvussu er fyrst síggja, hvussu gongdin við sjúkuni verður tann næsta mánaðin, sigur hann við The Guardian.



## USA lagt undir hópdráp

Nú verða amerikanskir hermenn lagdir undir beinleiðis medvirkan, tá fleiri túsund Taliban-fangar vórðu riknir av døgum í Afghanistan í 2001. Amerikanska herleiðslan fekk boð um, at krígsharrin Rashid Dostrum hevði tikið 4.000 hermenn hjá Taliban til fanga, og at vandi var fyri, at fangarnir kundu blíva avrættaðir. Kortini valdi stjórnin í Washington at lata krígsharran gera av, hvørja lagnu fangarnir fingu, sigur bretski hernaðarserfrøðingurin Robert Fox við Reuters. Úrslitið varð, at Taliban-fangarnir vórðu savnaðir saman í bingjur og síðani skotnir.



*Bjarni á Steig, virkandi yvirlækni, sigur, at fyri at avmarka tann búskaparliga skaðan av svínakríminum, verður eisini umhugsað at lata skúlar og dagsstovnar til børn, aftur í heyst. Avgerðin verður tikin ein av fyrstu døgunum, sigur hann*

# Føroyskir skúlar lata møguliga aftur í heyst

**Nú verður umhugsað at stongja allar skúlar og allar stovnar til barnaansing í heyst fyri at forða svínakrími at spjaða seg, sigur Bjarni á Steig, virkandi landslækni. Avgerðin verður tikin fyrsta dagin og tað kann saktans enda við, at summarfrítíðin verður longd í fleiri vikur ella mánaðir**

SVÍNAKRÍM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað kann væl henda, at summarfrítíðin hjá skúlabørnum og lærarum fer at verða longd í fleiri vikur ella mánaðir í ár.

Fyri at forða svínakrími í at spjaða seg, verður nevniliga umhugsað at longja summarfrítíðina og at stongja allar skúlarnar.

Tað sama ger seg galdandi fyri barnaansingarstovnarnar, sum kanska eisini verða stongdir í sama viðfangi.

Bjarni á Steig, virkandi yvirlækni váttar, at hetta er eitt tiltak, sum verður umhugsað fyri at forða fyri, at svínakrími skal spjaða seg.

Hann sigur, at júst í hesum døgum situr danska heilsustýrið og eftirmetir støðuna viðvíkjandi svínakrími og um ætlanin, sum longu er løgd fyri at at basa sjúkuni, skal endurskoðast.

Og hann váttar, at spurningurin um at stongja barnaskúlar og dagstovnar í heyst, er ein møguleiki, sum verður umrøddur í hesum sambandi.

Hann sigur, at ein av fyrstu døgunum kemur danska heilsustýrið til eina niðurstøðu og so fáa vit at síggja, um tað at lta skúlar og dagstovnar aftur, verður ein partur av tí.

### Fáa eitt andarhald

Virkandi landslæknin leggur afturat, at vit í Føroyum hava gjørt av at fylgja tilmælunum frádanska heilsustýrinum.

So mælir danska heilsustýrið til at stongja skúlar og dagstovnar, verður tað tilmælið eisini fylgt í Føroyum.

Og danska heilsustýri plaga hinvgin at leggja seg nokk so neyvt upp at tilmælum frá WHO, sum er alheims heilsustovnurin undir ST.

Og tað er nettupp WHO, sum hevur reist spurningin um at steingja allar skúlar og dagstovnar fyri at forða fyri smittuspjaðing.

Tey siga, at verður hetta gjørt, verður kanska fremsta smittuspjaðingar-keldan av øllum steðgað.

Alheims heilsufelagsskapurin, WHO, sigur, at endar hetta við, at skúlar og dagstovnar verða stongdir, verður tað við tí endamáli at fá eitt andarhald so at vit fáa betri stundir at gera neyðugakoppsetingarevnið, áðrenn smittan herjar á av álvara, væntandi tá ið liðið er nakað út á árið.

### Kostar øgiligar upphæddir

Else Smith í danska heilsustýrinum, sum stendur á odda fyri bardaganum ímóti svínakrími í Danmark, segði við danska TV2 í gjár, at tað kann verða skilagott at lata skúlar aftur.

Hinvegin eiga vit eisini at hugsa um, hvussu vit so leggja upp fyri, at børnini missa ein part av skúlagongdini, leggur hon afturat.

Tey vænta, at eini 25%-30% av fólkinum fara at leggjast við svínakrími, harav tey flestu verða í yngra endanum við tað, at tey, yvir 50 ár, vísa seg at vera í minni vanda fyri at verða smittað, enn tey yngru.

Tað fer at kosta samfelagnum øgiligar upphæddir í sjúkrafráveru og mistari framleiðslu.

Men verða skúlar og dagsstovnar stongdir, verður tað eisini ein dýr søga fyri samfelagið, tí tað fer at merkja, at nógv starvsfólk mugu verða heima at ansa børnum, sum ikki sleppa í skúla ella í ansing.

Hinvegin hevur tað eisini verið eitt tilmæli, at arbeiðspláss hvør sær leggja eina tilbúgvingarætlan at lata sum flest starvsfólk arbeiða heima, har tað yvirhøvur ber til.

Og skuldi tað hent, at ein stórur partur av fólkinum legst við krími, áðrenn koppsetingarevnið er til taks, verður tað sjálvandi eisini ein hópur av heilsustarvsfólki, sum fær sjúkuna og tað kann raka arbeiðið at niðurberja sjúkuna serliga hart, eins og tað fer at raka alla aðra sjúkuviðgerð og sjúkrarøkt.

### Viga fyri og ímóti

Bjarni á Steig sigur, at tað er ongin ivi um, at sama hvør loysnin verður vald, fer tað at kosta samfelagnum í dýrum dómum, so tað ræður um at gera eina heildarmeting av støðuni fyri at velja tað loysnina, sum samanlagt rakar samfelagið sum minst.

- Okkara fyrsta raðfesting er at bjarga mannalívum og har hava hava vit eina mynd av støðuni. Og hon er, at hetta vísir seg at vera ein mild sjúka. Hinvegin vísir tað seg, at tað eru ávísir bólkar, sum eru í størri vanda enn aðrir, men øllum tí partinum halda vit okkum hava eina greiða mynd av.

Onnur raðfesting er so at hyggja eftir, hvussu sjúkan rakar okkum samfelagsbúskaparliga.

- Í hesum sambandi verður fyrst og fremst hugsað um at koppseta fólk. Men er koppsetingarevnið ikki klárt, mugu vit hugsa um onnur tiltøk. Og í løtuni er onki koppsetingarevni og tí er tað at stongja skúlar og dagstovnar, eitt tiltak, sum hugsað verður um fyri at avmarkað tann samfelagsbúskaparliga skaðan av kríminum.

Men hvør endaliga niðurstøðan verður, veldst alt um, hvussu nógv tað tey ymsu tiltøkini fara at kosta samfelagnum og, hvussu vit avmarkað skaðan sum mest.

## Ongir nýggir tilburðir

Tað eru ongir nýggir tilburðir av svínakrími staðfestir seinastu dagarnar.

Tað fegnast Bjarni á Steig, virkandi landslækni um.

Hann sigur, at tað vísir seg sum um at kommunulæknar hava dugað væl at samskifta við fólk og at teir hava kannað fólk, har tað er viðkomandi.

Samstundis hava fólk sjálvi eisini borið seg rætt og skilagott at.

Tað hevur eisini hjálpt væl til, at fjølmiðlarnir hava verið beinasamir at kunna.

Higartil eru eini 100 fólk kannað og enn er svínakrím staðfest hjá 14 fólkum.

Sostatt sær út til, at í fyrstu atløgu, er smittan er niðurbard.

Men tað merkir so als ikki, at sjúkan er bast, tí tað verður væntandi ikki fyrrenn seinni í heyst, at krímið fer at herja av álvara, sigur Bjarni á Steig.

Hinvegin skriva útlendskir fjølmiðlar eisini, at í Meksiko, har sjúkan byrjaði, er hon longu við at hasa av aftur.

Læknar siga við útlendskar fjølmiðlar at tað vísir seg ofta, at evnini hjá einum virus, sum hesum,at smitta, viknar, tess longri vit koma út í smittuketuna. Tað merkir, at tann fyrsti, sum verður sjúkur, smitta reiðiliga illa, men tey, sum verða sjúk aftan á, smitta ikki líka illa so soleiðis viknar virus so hvørt sum tað breiðir seg. Tað eru sum ringar í vatninum, ið doyggja burtur, so hvørt sum teir breiða so. Tí er tað ein fyrimunur, so hvørt sum tíðin gongur.